# Handlar halda ikki tubbakslógina

**Nógvar kioskir og nógvir handlar halda ikki tubbakslógina og Almanna-og heilsumálaráðið hevur biðið fútan ansa eftir, at lógin verður hildin**

TUBBAKSSØLA

*Áki Bertholdsen*
aki@sosialurin.fo

Nógvir handlar og nógvar kioskir bróta lógina um sølu av tubbakki.

Tað staðfestir Almanna- og heilsumálaráðið.

Ráðið hevur tískil biðið fútan ansa eftir, at lógin verður hildin.

Tað, sum Ráðið serliga hugsar um, er at tað stendur í lógini sum sigur, at tubbaksvørur mugu ikki liggja á sølufremjandi støðum í handlum og kioskum.

– Hóast hetta stendur í lógini, eru tað í nógvum handlum og nógvum kioskum, at tubbak liggur á serstakliga sølufremjandi støðum, eitt nú beint við kassan, staðfestir Almanna- og heilsumálaráðið.

Ráðið hevur tí heitt á fútan um at fáa hesi viðurskifti í rættlag, so at lógin verður hildin.

Tá ið Løgtingið hevði orðaskiftið um fólkaheilsuætlanina, vóru tað somuleiðis tingmenn ið nevndu, at kioskir og handlar eisini selja sigarettir í leysum.

Tað er heldur ikki loyvt!

## Senda kanska eina áminning

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálaráðnum, sigur, at hetta er eisini eitt mál, sum ráðið fer at taka upp.

Hvussu farið verður fram hereftir, fer nú verða umrøtt í ráðnum.

Hann heldur, at ein gongd leið kundi verið at sent kioskum og handlum eitt skriv og mint tey á ásetingarnar í tubbakslógini.

Eitt nú heldur hann, at tað kundi verið ein máti at mint handlar og kioskir á, at tubbak skal ikki liggja á sølufremjandi støðum, at tað er ikki loyvt at selja í leysum og at tað er ikki loyvt at selja til ungdómar undir 18 ár.

Tað er heldur ikki loyvt at selja tubbak í automatum, tí so kunnu ungdómar undir 18 ár keypa sigarettir haðani.

Landsstýrismaðurin sigur, at upprunaliga hevði Landsstýrið sett í lógina, at tubbaksvørur skuldu ikki liggja á sjónligum staði í sølubúðunum.

Men trivnaðarnevndin hjá Løgtinginum linkaði hesa áseting og setti í lógina, at tað skuldi ikki liggja á sølufremjandi staði og tað samtykti Løgtingið.

Hans Pauli Strøm ásannar, at hetta ger lógina torførari at umsita, tí tað kann altíð vera eitt ivamál um, hvat eitt sølufremjandi stað er.

Men hann heldur kortini, at ongin ivi er um, at tað er ólógligt at hava tubbaksvørur við kassan, beint fyri eygunum á viðskiftafólkinum.

Í øllum førum er hetta nú eitt mál, sum Almanna- og heilsumálaráðið fer at taka upp fyri at fáa hesi viðurskifti í rættlag.



*Hóast tað stendur í lógini, at sigarettir mugu ikki vera á sølufremjandi staði, eru tað nógvir handlar og nógvar kioskir, sum hava tær standandi á serstakliga sølufremjandi staði, sigur Almanna- og heilsumálaráðið, sum nú vil hava fútan at ansa eftir, at lógin verður hildin*

# Tubbakslógin ring at halda

**– Tubbakslógin kann vera torfør at umsita, tí orðingarna eru heldur ógreiðar,, heldur varafútin**

TUBBAKSLÓGIN

*Áki Bertholdsen*
aki@sosialurin.fo



– Tubbakslógin kann vera torfør at umsita.

Tað ásannar Finn Ougaard, varafúti.

Sum tað sæst í aðrari grein í blaðnum, hevur Almanna- og heilsumálaráðið biðið fútan ansa eftir, at tubbakslógin verður hildin.

Tað, sum ráðið serliga hugsar um, er ásetingin um, at tubbak má ikki vera á sølufremjandi staði í einum handli ella eini kiosk.

Og hetta kann verða ein trupulleiki, tí tað kann vera torført at meta um, hvat er eitt sølufremjandi stað og hvat er ikki, heldur varafútin.

– Tað er altíð torført at umsita eina lóg, sum ikki er heilt greitt orðað og tað hevði verið ynskiligt at lógin var greidligari orðað, leggur hann afturat.

Hann sigur, at fyri at fáa greiði á, hvussu lógin skal tulkast, skal fyrst ein praksis byggjast upp á økinum og tað kunnu bara dómstólarnir gera.

Anars hevur Fútin fleiri ivamál í sambandi við tubbakslógina.

Eftir lógini er tað ikki lógligt at selja tubbak í automatum og fútin hevur spurt Almanna- og heilsumálaráðið um ætlanin er at tað skal vera fullkomiliga bannað at selja sigarettir í automatum og sostatt eisini úr automatum, sum eru á støðum, har almenningurin ikki hevur atgongd.

Almanna- og heilsumálaráðið hevur svarað fútanum aftur, at tað er ikki loyvt at selja sigarettir úr automatum yvirhøvur, heldur ikki úr automatum á støðum, har almenningurin ikki hevur atgongd.

## Hava ikki eftirlit

Annars staðfestir varafútin, at uppgávan hjá løgregluni er ikki at hava eftirlit við um ein lóg verður hildin.

– Uppgávan hjá løgregluni er at traðka til, tá ið illgruni er um lógarbrot, tí tá kemur løgreglan upp í og ger eitt mál burturúr tí.

Hann sigur, at fyri at løgreglan skal gera nakað í hesum føri, skal tað til, at onkur meldar eina kiosk ella ein handil fyri at bróta tubbakslógina.

Ella skal løgreglan sjálv koma fram á illgrunaverd viðurskifti.

Men tað er ikki nakað, sum løgreglan hevur serligt eftirlit við.

Tubbakslógin er eitt heilsufremjandi tiltak og tí skuldi tað verið heilsumyndugleikarnir, sum hildu eyguni við um fólkaheilsan er í vanda.

Honum vitandi hevur løgreglan ikki reist nakað mál um brot á tubbakslógina.

**FAKTA**

**TUBBAKSLÓGIN**

Tá ið Hans Pauli Strøm legði uppskotið fyri Løgtingið, stóð í lógini, at:

Tubbaksvørur mugu ikki liggja á sjónligum støðum, har almenningurin hevur atgongd, eitt nú í kioskum, handlum, matstovum og skeinkistøðum.

Loyvt er ikki at selja tubbaksvørur í sjálvtøkum.

Men ein meiriluti í Løgtinginum broytti hetta og gjørdi tað linari. Tað, sum Løgtingið samtykti, var:

Har, sum søla av tubbaksvørum fer fram, eiga hesar ikki at liggja á sølufremjandi støðum í sølubúðunum.